# Vanlukka í Vágatunnlinum

**Talan var tíbetur bert um eina venjing, men bjargingarskipanin fekk av álvara staðið sína roynd, tá ein eftirgjørd vanlukka í Vágatunnlinum kravdi fleiri mannalív, umframt at nógv vórðu løstað**



REPORTASJA

*Orð: Eydna Skaale*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Vanlukkan**:
Ein bussur, fullur av ferðafólki, er á veg til Vágarnar. Brádliga punkterar eitt av hjólunum og førarin missir tamarhaldið á bussinum. Hann koyrir frontalt inn í ein mótkoyrandi bil og báðir bilar steðga á staðnum. Ein lastbilur, ið eisini er á veg til Vágar, og sum koyrir aftanfyri bussin, nær ikki at steðga, men renir upp í reyvina á bussinum, og eldur kemur í.

**Kl. 19.53** nýtir bussførarin eina av neyðtelefonunum. Hann fær beinleiðis samband við alarmcentralin í Havn og boðar frá, at 18 fólk eru í bussinum, 2 eru fastkloynd í mótkoyrandi bilinum, og ein førari er somuleiðis fastur í lastbilinum. Tað er eldur í, og nógvur roykur. 1,9 km eru til munnan Vágamegin, 3,0 km eru til munnan Leynamegin.

**Uml Kl. 19.58** fær alarmsentralurin eina fráboðan afturat. Ein bilur er farin inn í tunnilin Leynamegin, men orsakað av nógva roykinum frá fyrstu vanlukkuni, hevur hann mist tamarhaldið, og hevur rent inn í tunnilsveggin. Fýra fólk eru inni í bilinum, meðan ein er uttanfyri. Tey eru stødd 50 metrar frá munnanum Leynamegin.

*Hvat víðari hendi her, veit Sosialurin ikki, eftirsum vit vóru stødd har stóra vanlukkan hendi.*

**Kl. 20.13** koma boð umvegis samskiftistólið, at sløkkiliðsmenn frá Vágoynni eru uttanfyri tunnilin. Teir koyra inn í tunnilin, og siga allatíðina frá, hvussu langt inn teir eru komnir, og um teir síggja nakað. ...»1,2 km, vit síggja framvegis einki«... »1,4 km, nú síggja vit okkurt«... »1,6 km, vit síggja ein buss, og tað rýkur úr honum. Her er nógvur roykur«

**Kl. 20.18** eru fyrstu brandmenninir komnir á staðið. Eini fýra ella fimm av offrunum, sum hava gingið og malið síðan vanlukkan hendi, leypa á sløkkiliðsmenninar og rópa og skríggja um hjálp. Tey vera skúgvað til viks, meðan brandmenninir bera skjótt at, og byrja at sløkkja eldin. Í bussinum banka fólk á rútarnar, og rópa um hjálp. Offrini uttanfyri bussin ganga og mala, púra hjálparsleys. Umvegis samskiftistólið koma fyrispurningar frá báðum tunnilsmunnum, um hjálp skal koma inn. Sagt verður, at ambulansurnar skulu bíða, tí fyrst fara teir at sproyta við skúmi. Ein brandbilur afturat kemur frá Vágoynni.

**Kl. 20.25** fer fyrsti brandmaðurin inn í bussin. Hann boðar frá, at tað eru 12 fólk inni í bussinum og eini 4 ella 5 ganga og mala uttan fyri bussin. Nøkur eru illa skadd, meðan onnur eru betri fyri. Innsatsleiðarin Leynamegin boðar frá, at tvær ambulansur eru tøkar teirru megin, og spyr um tær skulu sendast inn. Leiðarin inni í tunnlinum heldur tað vera frægast at fáa ambulansuna at koma frá Vágunum, av tí, at nógvur roykur framvegis er, og vindurin blæsir hann ímóti Leynum. Løtu seinni staðfesta teir Leynamegin, at roykurin er nógv minkaður, og tað er trygt at koyra.

**Kl. 20.34** kemur fyrsta hjálpin frá Leynamunnanum. Tað er ein brandbilur úr Kvívík. Eingin roykur er

---

### Sunrid Isaksen, Kvívík
### Ferðsluoffur: Illa brend, bangin



**Sat í einum bili nakað innanfyri tunnilsmunnan, Leynamegin**

*Hvussu upplivdi tú hesa bjargingina?*

– Eg helt, at tað gekk heilt ótrúliga skjótt fyri seg. Politiið úr Havn var har beinanvegin, aftaná, at vit ringdu. Og ein ambulansa út Vestmanna. Eg var yvirraskað av, hvussu stutt tíð gekk til teir vóru hjá okkum.

*Merkti tú, at tú fekk ta hjálpina, sum tú hevði viljað havt, um tað var veruligt?*

– Teir dugdu øgiliga væl at snakka við okkum, og sissa okkum. Men eg var illa brend, og tí tóku teir sær slett ikki av. Tað var kanska eitt sindur keðiligt. Men eg bleiv beinanvegin sett inn í ambulansan, meðan teir fóru at leita eftir øðrum offrum. Okkara vanlukka var so lítil, í mun til hina, sum var longur inni í tunnlinum, men politiið tók sær sera væl av okkum.

*Ert tú betryggjað, nú tú hevur sæð, hvussu ein bjarging fer fram?*

– Ja, tað eri eg.

### Malan Johansen, Streymnes
### Ferðsluoffur: Smekkað høvdið í, pínu í høvdinum, forvirrað



**Sat í bussinum, 1,9 km inni í tunnlinum, vágamegin**

*Hvussu upplivdi tú hesa bjargingina?*

– Tað er eitt sindur ringt at siga, tí eg veit ikki hvussu bjargingarmenninir áttu at prioritera undir bjargingini. Men vit royndu í øllum førum at gera tað so veruligt sum gjørligt. Eg sat inni í bussinum, og eg var eitt sindur ótolin. Eg helt ikki at tað gekk serliga skjótt fyri seg.

*Merkti tú, at tú fekk ta hjálpina, sum tú hevði viljað havt, um tað var veruligt?*

– Brandmenninir komu fyrst á staðið, og teir gjørdu tað, sum brandmenn eiga, nevniliga at sløkkja eldin. So komu teir inn í bussin til okkum, sissaðu okkum, og hugdu at skaðunum. Men teir gjørdu einki fyri at hjálpa. Eg haldi, at tað gekk ræðuliga long tíð inntil læknin kom. Og ambulansan kom eisini langt aftaná brandmenninar. Eg hevði ein so mikið lættan skaða, at eg bleiv ikki raðfest serliga høgt, og tí kom hjálpin ógvuliga seint til mín. Men hetta var fiktivt, og tað ávirkaði eisini tað heila. Man merkti, at teir tóku tað ikki so seriøst.

*Ert tú betryggjað, nú tú hevur sæð hvussu ein bjarging fer fram?*

– Nei, tað haldi eg ikki. Eg haldi, at tað gekk ræðuliga long tíð, til offrini fingu hjálp.

### Gerda Mortensen, Streymnes
### Ferðsluoffur: Brotið nøsina, bangin



**Sat í bussinum, 1.9 km inni í tunnlinum, vágamegin. Gekk aftaná bjargingarmonnunum og »órógvaði« teir í arbeiðnum**

*Hvussu upplivdi tú hesa bjargingina?*

– Jú, eg haldi, at tað gekk hampiligt. Men eg føldi ikki, at nakar tók sær av mær, og hinum, sum vóru nøkulunda fyri eftir óhappið. Vit gingu bara og mólu. Brandmenninir settu okkum bara til síðis, og tað sama gjørdi portørarnir. Ikki fyrr enn politiið kom á staðið, var tað onkur sum tók sær av okkum. Og tá blivu vit eisini bara trýst inn í ein lítlan pickup bil. Tað hevði virkað øgiliga ógvusligt upp á meg, um tað var hent ordiligt.

*Merkti tú, at tú fekk ta hjálpina, sum tú hevði viljað havt, um tað var veruligt?*

– Nei, vit fingu ongan respons frá brandmonnunum, sum vóru fyrstir á staðið. Teir søgdu bara við okkum, at »bíða nú, ambulansan fer at koma«. Men man merkti eisini væl, at tað bert var ein venjing. Onkur av bjargingarmonnunum flenti bara, tá vit togaðu í teir. Og vit høvsu nokk eisini verið meiri hysterisk, um tað var ein verulig vanlukka.

*Men ert tú betryggjað, nú tú hevur sæð hvussu ein bjarging fer fram?*

– Ja, tað eri eg. Tað virkaði sum teir vistu hvat teir gjørdu, og tað merktist væl, at hetta bara var ein venjing.